"salurin", har til dømis veitslur v.m. vóru hildnar.

Tey áttu einkarsonin Christian Dahl- Restorff, føddur 5/5-1909.

Tá ið Johanna gjørdist einkja í 1916, lá fyri henni eitt langt og strævið tíðarskeið. Men við áræði og av øllum alvi eydnaðist henni at varðveita húsini á egnum hondum, soleiðis at sonurin kundi vaksa upp undir tryggum og góðum umstøðum.

Johanna, sum hevði lært á húsarhaldsskúla í Danmark, tók ofta ungar kvinnur av bygd til upplæring í húsarhaldi og matgerð. Hettar fyri at skoyta uppí sína innkomu at halda stóru húsini, eftir at hon gjørdist einsamøll við syninum Christian.

Hann mintist annars bert ein túr saman við pápa sínum.

Tá hevur Christian verið um 5 ár og pápi hansara 61 ár.

Í Amtmansbrekkuni møta teir gamla Traber, og teir eldru byrjaðu eitt prát, sum varð so drúgvt, at lítli Christian varð „gloymdur" og „stakk av" til hús einsamallur. Soleiðir endaði túrurin hjá feðgunum.

Gerandisdagur teirra við Áarvegin broyttist so mikið, at neyðugt varð at leiga stórar partar av húsinum út fyri at kunna gjalda hvørjum sítt.

Eitt nú høvdu brøðurnir Jákup og Jógvan við Stein sjómansskúla á salinum eina tíð.

## Christian mundi doyð av tuberklum

Christian Dahl-Restorff giftist í 1938 við Marie Joensen, fødd 30/9-1913, dóttur Hans Joensen, keypmann, undir Kletti í Havn.

Hann kom at vaksa upp á Áarvegnum hjá móður síni Johanne Frederikke, tí longu sum 7 ára gamal misti hann pápan.

Christian fór at ganga í Thorshavns Realskole. Hann kom eisini at ganga til undirvísing í latíni hjá Jákup Dahl prósti. Hann fekk UG til royndina, og hesin lærdómur kom honum væl við, táið hann fór á Birkerød, og var hetta honum ein barlast gjøgnum alt lívið.

Sum 16 ára gamal fór Christian á kostskúla á Birkerød Statsskole, har ætlan hansara var at lesa víðari til løgfrøðing. Men hann gjørdist tuberklasjúkur, og noyddist at gevast við lestrinum longu árið eftir. Hann var so illa fyri, at mamman kom niður við sjóverjuskipinum Beskytteren til hansara, tí tey væntaðu Christian fara at doyggja.

Men á undursaman hátt kom tó vend í, og veikur og ússaligur kom Christian heimaftur. Heim afturkomin fór hann at starvast sum skrivstovumaður hjá handilsvirkinum Poul í Geil, og har starvaðist hann í eini fimm ár. Poul var var sera góður við hann.


*Skipið hjá Restorff Frederiksvaag, har Johan var skipari*



*Frederiksvaag gekk burtur í ódnarveðri 5. Mars 1913 við Læsø. Navnabrettið rak á land í Skagen og hongur á Hotel Hafnia*

Ein minnisvarði frá hesi tíð er sokallaða "Lysthúsið". Tað var bygt í 1928 og sett upp í Restorffsgarðinum, fyri at Christian har kundi hava møguleika at finna hvíld og heilsubót í líggja vesturskininum. Í dag stendur "Lysthúsið" vestanfyri húsini hjá Johan M. Restorff í Jóan Karlsgøtu 10 í Havn.

Christian styrknaði og mentist sum frá leið, og í 1934 letur hann upp handilin "Tubbak" við Áarvegin og kom at selja tubbaksvørur v.m. bæði í heil- og smásølu.

Til hetta kravdist eginpeningur, sum var ringur at fáa í hesum krepputíðum, sum tá vóru.

Tí gjørdi Johanna av, at selja apotekara Juhl ein part burturav havanum norðanfyri húsini fyri á tann hátt at útvega soninum fígging.

Christian gloymdi ikki sínar tuberklasjúku felagar. Hann seldi eisini í handlinum lutir, sum vóru framleiddur av sjúklingum á Sanatoriinum. Eina ferð árliga, á Ólavsøku, ruddaði hann framsýningargluggan fyri sluppmodellið, gjørt av sjúklingum sjálvum, sum var høvuðsvinningur á tí árligu lutaseðlasøluni hjá sjúklingunum.

Mangur skipsmaður kom inn á gólvið, áðrenn túrurin byrjaði og keypti uppá borg. Tá ið avrokningin eina ferð kom, gjørdi hann slætt borð. Eitt orð er eitt orð og ein maður er ein maður. Soleiðis var tað bara.

Tá ið mest var at gera, stóð Christian ofta sjálvur fjórði í handlinum. Serliga stór var sølan upp undir høgtíðir og ikki minst tá ið jólagávur skuldu keypast.

## Hotel Hafnia

Í 1950 byggir Christian nýbygning á økinum millum privathúsini og Tjaldurs Apotek. Í gøtuhæddini vóru handilshøli, og annars skrivstovuhølir og kømur við atgongd til køk at leiga út.

Um sama mundið varð aftur kreppa í samfelagnum og øll leigumál vórðu uppsøgd, og samstundis brennur ein brennivargur Hotel Føroyar í grund.

Christian stendur tá við einum nærum tómum bygningi, samstundis sum hotel manglar í býnum.

Eftir at hava hugsað seg um eina tíð, tekur hann avgerð um at byrja hotel- og matstovuvirksemi í bygninginum, og sjálvur fer hann frá "Tubbak" inn í hesa nýggju, spennandi og krevjandi vinnu. Eftir tátíðar tørvi var hetta eitt nýtímans hotel við matstovu undir navninum hotel Hafnia. Navnið var eftir uppskoti frá Petur Háberg.


*Hetta barometrið fingu Johanna og Johan í brúðargávu frá skiparafelagnum*

Fyrsti gesturin flytur inn í november 1951.

Seinni, í 1956, varð ein hædd bygd omaná hotellið. Í 1958 fekk hotellið enn eina hædd, "Parnassið", navngivið av tí nýstovnaða "Føroya Rithøvundafelag", sum helt fyrsta fundin í hølinum.

Køksbygningurin kom í 1964, og tey gomlu húsini hjá Johan M. Restorff vóru niðurtikin í 1965.

Á økinum verður nýggjur hotelbygningur reistur, og í mai 1968 er Hafnia fyrsta hotel í Føroyum, har kømur hava egið bað og toilet.

Í 1979 vóru tey gomlu avhaldshúsini frá 1878 keypt og niðurtikin, og tá varð aftur bygt uppí hotellið í 1980. Siktið var, at hotellið lúkaði øll nútíðar hentleikakrøv.

Christian var eingin reypari. Ongantíð nevnir hann seg hotelstjóra, men brúkti sama gamla "visitkort" við " Grosserer", heilsølumaður, frá tíðini í Tubbak (1934 – 1965).

Christian gekk inn á gólvið at heilsa Hafnia-kundum, so leingi hann orkaði.

Tann 1.1.2005 varð hotellið selt.



*Fyrsta Hotel Hafnia avmyndað á brævbjálva*



*Hetta er upprunaliga "private hotel" hjá Johan Restorff*

## Tónleikarin

Christian Restorff hevði eisini góðar tónlistagávur og spældi uppá violin í ymiskum orkestrum sum t.d. "Jazzband Triumph" og "Ljómi", sum spældu til dans í Tórshøll og Klubbanum eins og við "Gágguni", sum spældi í Sjónleikarahúsinum. Hnn gavst við hesum í 1938.

Tó helt hann á at spæla við Tórshavnar Musikkskúla saman við Erik Petersen, Verlandi Johansen, Viggo Dal-Christiansen og øðrum.

Hann var nærlagdur og dúgligur violinspælari, og helst var hann ein góður stuðul hjá musikkskúlanum hesi árini.

Sum ungur gjørdi hann seg eisini galdandi innan fótbolt, tá hann longu sum 17 ára gamal kom at leika á 1. liði hjá Havnar Bóltfelag eina tíð, til heilsan skerdi hansara førleika. Hann var limur í bygginevndini fyri fyrsta HB-húsið, bygt í Gundadali.

Christian doyði tann 18/2-1997 og Marie 16/8-1999. Henda greinin kann eisini vera eitt hóskandi høvi at minnast Christian, sum hevði fylt 100 ár 5. mai í komandi viku.

Johanna doyði í 1964. Tískil kom søgan hjá hesum báðum at strekkja seg yvir 110 ár frá 1853-1964.

*Keldur:*
*William Heinesen*
*Johan R. Jacobsen*
*Jógvan Arge*
*Sverri Dahl*
*Johan M. Restorff*

**Komandi partur**
Komandi partur verður um ein annan hoteleigara, nevniliga Christian Edvard Djurhuus og konu hansara Onnu Katrinu